# Synd fær tann, sum synd er í

Leikur: Verkætlan Laramie
Høvundur: Moisés Kaufmann
Framførsla: Leikhúsið Skift við: Maritu Dalsgaard, Gunnvá Zakariasen, Biritu Dam, Ega Dam og Hjálmar E. Dam
Leikstjórn: Solveig Weinkouff


*Marita Dalsgaard, sjónleikari*

**LEIK-UMMÆLI**
*Carl Johan jensen*

Verkætlan Laramie eitur ein amerikanskur leikur, sum í hesum døgum verður framførdur í Müllers pakkhúsi í Havn. Evnið í leikinum er sannsøguligt, t.e. byggir á eina veruliga hending ella hendingar, sum fóru fram í smábýnum Laramie í státinum Wyoming fyri smáum tíggju árum síðani.

Ein ungur maður, Matthew Shepard verður ein morgunin funnin í óbygdum, bundin á hondum og fótum í eitt hegn av píkatráði, hangandi sum eitt krossfest, ikki bert pínslaður, men so illa viðfarin, at hann fáar dagar seinni doyr av løstunum, hann hevur fingið.

Dráp, ófjálgt og ræðuligt sum tað er, er eyðvitað ódømi á bygd í Amerika, tað sama sum hjá okkum. Men hetta drápið er ikki sum dráp flest. Her er blóð úthelt í øðrum samanhangi enn teirri andarhaldsins samanbræðing av forvitni, óhugi og samkenslu, sum einsamallar yvirskriftir í tíðindamiðlum kunnu elva til. Hetta er dráp við øðrvísi søguligum og samfelagsligum ættarbregði. Amerika er ikki er bert eitt samveldi av státum, men eisini í aðrar mátar eitt fjølkynjað og (sæð í norðurevropeiskum ljósi ið hvussu er) fjølmótsett og ósambæriligt samfelag, har óflættiligur trúar-, húðarlits- og annar munur aftur og aftur hevur elvt til mistrúgv og órógv og samlagið millum borgararnar tí ofta verið tvørligari enn tey kanska hugsaðu sær, sum fyri tvey hundrað og tretivu árum síðani orðaðu ta frælslyndu stjórnarskrá, ið var og enn er ein hornasteinur undir amerikanska samfelagnum. Við jøvnum millumbilum og serliga í tíðum, tá ið ólag hevur verið í búskapinum og kenslan av órætti hevur bøklað seg upp í tilvitið hjá fólki sum dimm skýggj, hava politiskir og andligir leiðarar, slíkir, ið sóknast eftir valdi, men lítið vita sær at gera við tað, bokslað hesa mistrúgv og leitt sítt fólk út í hatur og myrkursgerðir.

Dømini eru mong og ódámlig, eitt nú yvirgangurin móti littum í suðurstátunum í tretivuárunum (hann er m.a. fyndarvæl lýstur í sanginum *Strange fruits*, sum Billy Holliday gjørdi kendan). Tey seinastu fjøriti árini er mangt tó broytt tann betra vegin, amerkanska samfelagið bjóðar t.d. littum heldur frægari kor nú á døgum enn fyrr. Kortini breiðir tað farna skugga á samtíðina. Ógerðirnar og níðingsskapurin í fortíðini eru ikki farin longur undir kav søgunnar enn so, at tey viðhvørt bredda undan aftur í almennum orðaskifti vestanhavs ymiskt sum ring samvitska, ymiskt sum eftirsjón, eitt slag av politiskum máttloysi, ið hvørja løtu kann sláa upp í hatursloga, um høvi gevst (partar av eftirspælinum, sum yvirgangsálopini 11. september tjúguhundrað og eitt fingu, kunnu, tíverri, takast til vitnis um tað).

Men hvat er tað so við hesum Matthew Shepard, sum ger, at málið um hann líkist burturúr og fær heilt aðra vend enn onnur drápsmál, ið yvirhøvur gloymast líka skjótt, sum yvirskriftirnar tey fáa í fjølmiðlunum?

Munurin er at Matthew Shepard er samkyndur. So skjótt tíðindini um drápið spyrjast út um býarmørkini í Laramie, Wyoming, vaknar illgruni um, at drápið er eitt hatursdráp ella sagt við øðrum orðum: Matthew Shepard læt lív orsakað av teimum fordómum, sum samfelagið hevur um kynsliga tilhall hansara. Best sum er verður smábýarsamfelagið Laramie drigið upp í almenna ljósmálan úr tí myrka dýpi av tøgn, har tað hevur hult seg sjálvt frá sær sjálvum. Nú má tað brádliga standa til svars fyri tað spøkilsið, sum illgerðin móti Matthew Shepard, kynvillinginum, bakløðaranum o.s.fr., hevur manað fram í samamerikanskt søguminnið og samtíðartilvit.

### Bygnaður

Leikurin byggir, sum sagt á drápsmálið um Matthew Shepard og tað eftirspæl málið fekk. Í bygnaði minnir verkið mest av øllum um ein heimildarfilm í gerð (men onkrir træðrir liggja eisini aftur í klassiska amerikanska leikgerð, t.d. í *Our Town* (1938) eftir Thornton Wilder). Leikurin er skjótt sagt ein pallsett frágreiðing um málstilgongdina og um hvussu drápið og avleiðingarnar av tí svara aftur í býarfólkinum. Megintemað er sjálvandi fordómurin. Hvaðani kemur óttin fyri tí, ið bregður frá og onkursvegna er rangvørgt? Hvussu sleppur hesin óttin at breiða mistrúgv og agg frá sær, ið spakuliga legst á siðferðina eins og grástar á eygað?

Út ígjøgnum leikin birta ymsar røddir fordómin í skiftandi ljósi, viðhvørt trúarligum, viðhvørt verðsligum. Men sum vera man hjá hálv-siðblindum ber ljós sjáldan øðrvísi á enn sum hykl, sama hvussu væl og hvussu leingi tað lýsir. Býarfólkið ivast ikki í, at tað sum hent er, er ræðuligt, ja beinanvegin ófyrigeviligt. Íbúgvarnir í Laramie eru yvirhøvur lóglýðin og hanpulig fólk, sum ikki biðja hund standa frá sær. Tey halda seg ikki vera petti aftari enn onnur. Eingin hevur nakað siga teimum upp á bakið og so slettis ikki í stórbýunum. Teimum tykir synd í Matthew Shepard, tað er vist, hjartaliga synd og tey harmast øll um ta ringu lagnu, honum var fyri. Men hvussu er og ikki, tá ið saman um kemur vil hann kortini fáa syndina, sum synd skuldi vera í. Ein djeikari kann, skilst á lagnum, kann bara takka sær. Ordiligt fólk ger ikki sovorðið bara soleiðis av hissini.

Smátt um smátt verður drápið bara eitt dráp av mongum í eygunum á býarfólkinum. Umrøðan, sum tað fær landsvítt í fjølmiðlunum, alt rokið, sum stendst av tí, tekur seg við tíðini út sum ágang móti einum verjuleysum smábýi á landsbygd í Wyoming.

Og fátt blindar betur enn fíggindi, sum er felags.

### Um sýningina

Leikararnir, sum gera sýningina í Müllers pakkhúsi eru millum teir bestu, vit í løtuni eiga og tað sæst eyðvitað eisini aftur í framførsluni. Tað er ikki bara sum at siga tað hjá fimm fólkum at skapa fleiri enn fjøriti ymiskar persónar fram fyri áskoðaran upp á minni enn tveir tímar - og gera tað trúverduga.

Kortini er hetta ikki, skal eg siga sum er, ein stór leiklistarlig uppliving.

Hon er góð gaman í, men ikki meir.

Kanska er tað uppleggið, sjálvt leikritið, sum okkurt er galið við. Ella møguliga kundi sjálv uppsetingin verið øðrvísi, sýningin styttri og miðvísari.

Ikki tí evnið er viðkomandi, tað bilar ikki, men leikurin kemur tær ongantíð á óvart og persónarnir eru óofta skrivaðir soleiðis, at teir eru eins og kynstrig pappírsklipp av ymsum, ið langt síðani eru knæsettar sannroyndir um evnið - á prenti javnt sum á palli, skíggja ella lørifti (tak t.d. filmin *American Angels*, ið víst verður beinleiðis til í sýningini).

### Málið

Í skjótt rættiliga nógv ár hevur stavnhaldið verið, at føroyskt pallmál skal vera so talumálsligt, at tað mangan gerst *talumálsligari* enn talumálið sjálvt. Málið í hesari sýningini liggur mitt í slagnum, so tjúkt í danismum sum kavaæl av flyksingi. Eg haldi, álvaratos, at tað er tíð upp á at endurskoða hesa kredduna. Pallmál skal vera liðiligt, skal vera atkomiligt, tað sigur seg mest sum sjálvt, og tað kann saktans ýtast av eftir talumáli bæði í orðatilfari, setningslagi og rútmu. Hinvegin er pallmál ikki og hvørki kann ella eigur at vera talumál, men ein ímynd av talumáli á palli. Tey seinnu árini eru alt ov nógvar palltýðingar ikki komnar upp ímóti tí talumáli, tær í yvirhuga royna at líkjast, men bera í staðin ein keðiligan dám av ryggbrotnum donskum pallritmáli.

Spyrst so livst